# Vísir ein stóran trupuleika við at yvirtaka fólkakirkjuna

**At ivamál nú er reist um, at Jógvan á Lakjuni er vorðin landsstýrismaður í kirkjumálum, er eitt rættiliga gott dømi um tann trupulleika, ið yvirtøkan av fólkakirkjuni kann føra til, sigur Jákup Reinert Hansen, formaður í Prestafelagnum**


*Vit mugu spyrja, hvussu stórt vald, politiski myndugleikin skal hava yvir kirkjuni, sigur Jákup Reinert Hansen, formaður í Prestafelagnum í Føroyum*

FÓLKAKIRKJAN OG LANDSSTÝRISMAÐURIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta vísir bara, hvørjar trupulleikar, ið kunnu standast av at yvirtaka fólkakirkjuna.

Tað heldur Jákup Reinert Hansen, formaður í prestafelag Føroya um avgerðina at seta Jógvan á Lakjuni, sum ikki er limur í fólkakirkjuni, at umsita kirkjumál í landsstýrinum.

Endamálið við Prestafelagnum er at verja fakligu áhugamálini hjá prestunum og felagið fæst ikki so nógv við kirkjupolitisk mál.

Men nógvir spurningar eru sjálvsagt samanhangandi og formaðurin í prestafelagnum hevur eisini sína hugsan um støðuna, sum hevur tikið seg upp, eftir at Jógvan á Lakjuni varð settur í starvið sum landsstýrismaður í kirkjumálum, hóast hann er limir í brøðrasamkomuni, sum er grundleggjandi ósamd við kirkjuna um nógv viðurskifti.

Men hann leggur dent á, at spurningurin er ikki viðgjørdur í Prestafelagnum, so hetta stendur fyri hansara egnu rokning.

### Vísir ein grundleggjandi trupuleika

Og formaðurin í Prestafelagnum sigur, at ivamálið, sum nú hevur tikið seg upp um landsstýrismannin, vísir ein rættiliga grundleggjandi trupuleika í arbeiðnum at yvirtaka fólkakirkjuna.

– Hann sigur, at drotningin er føddur limur í fólkakirkjuni. Og tað er eisini drotningin, sum tilnevnir biskupar eftir at prestarnir og kirkjuráðini hava valt teir. Og tað er eisini drotningin, sum loysir biskuparn-ar úr úr starvi aftur.

– Somuleiðis er tað drotningin, sum setir nýgg ritual í gildi. Eitt nú ritual fyri barnadóp og konfirmatión.

Jákup Reinert Hansen sigur, at hesi ritualini eru ein mynd av tí, vit trúgva uppá.

Men hann spyr, hvussu verður, tá ið øll ábyrgd fyri fólkakirkjuna verður yvirtikin.

– Hvør skal tá koma ístaðin fyri drotningina, spyr hann. Hvør skal so seta ritual í gildi og hvør skal so seta biskupar og loysa teir úr starvi aftur.

Jákup Reinert Hansen heldur ikki at tað ber til at krevja, at ein landsstýrismaður ella at ein løgmaður skal vera limur í fólkakirkjuni.

– Vit hava áður havt løgmann, sum ikki hevur verið limur í fólkakirkjuni (Jógvan Sundstein, blm.)

– Men tað er eitt sindur margháttligt, at tað kanska framyvir skal vera ein landsstýrismaður, ella ein løgmaður, sum ikki er limur í fólkakirkjuni, sum nú skal seta ritual í gildi í fólkakirkjuni.

Hann væntar tó ikki, at ein landsstýrismaður hevði farið og gjørt broytingar í innaru viðurskiftunum í kirkjuni.

– Tað hevði neyvan komið fyri, men reint teoretiskt er vandin til staðar, og tí hevur tað alstóran týdning at hava púra greið viðurskifti, leggur hann afturat.

– Tað er alneyðugt at hava púra greitt mark ímillum tey ytru og innaru viðurskiftini hjá fólkakirkjuni, tí tað skal ikki bera til hjá einum politikara at legga seg út í viðurskifti, sum viðvíkja okkara trúgv og trúarjáttan.

Jákup Reinert Hansen sigur, at sostatt kunnu vit seta okkum tann grundleggjandi spurningin, um tað er rætt, at politiski myndugleikin hevur slíkt vald yvir fólkakirkjuni.

– Ein annar møguleiki kundi verið at at lagt hendan myndugleikan í onkran annan stovn. Í hesum sambandi hevur tað onkuntíð verið nevnt, at kirkjan sjálv skuldi valt sær eitt evstaráð, sum so fekk myndugleikan, sum drotningin hevur nú.

Í sambandi við fullveldisætlanina varð viðhvørt nevnt, at vit skuldu hava felags drotning við Danmark, hóast vit fingu fullveldið. Kann drotningin so ikki framhaldandi hava hendan formliga myndugleikan yvir kirkjuni, hóast hon verður yvirtikin?

– Tað er sjálvandi ein politiskur spurningur. Men skal drotningin framhaldandi hava myndugleikan at seta biskupar í starv, loysa teir úr starvi og at seta ritual í gildi í fólkakirkjuni, verður jú ikki talan um eina fullkomna yvirtøku. Tað er heldur onki samband ímillum drotningina og landsstýrið og Løgtingið, eins og tað er samband ímillum drotningina og fólkatingið í Danmark.

Formaðurin í Prestafelagnum sigur, at júst hesin spurningurin hevur verið ein spurningurin, sum hevur ligið í buktini í samráðingunum ímillum Føroya og Danmark um yvirtøku av kirkjuni.

### Umfatar øll trúarsamfeløg

Formaðurin í Prestafelagnum vísir eisini á, at ætlanin er helst at yvirtaka alt málsøkið sum tað er og ikki bara sjálva fólkakirkjuna.

Hann hugsar um, at uppi í hesum málsøkium eru eisini øll tey trúarsamfeløgini, sum eru uttanfyri Fólkakirkjuna.

– Í Føroyum eru ikki nógvar reglar fyri hesi trúarsamfeløgini, men aðrastaðni skulu trúarsamfeløg lúka ávísar treytir og so verða tey góðkend sum trúarsamfeløg.

Men men tað hava vit ikki í Føroyum.

– Hetta merkir, at tað limagjald, sum fólk lata til hesi trúarsamfeløg, sum tey hoyra til, kunnu tey heilt ella partvís draga av frá í skatti.

Men tá ið so staturin samstundis, við hesum, frásigur sær rættin til ein part av skattinum, er tað óbeinleiðis talan um almenna studning til hesi trúarsamfeløg.

Jákup Reinert Hansen sigur, at eitt, sum vit eiga at hava í huganum í sambandi við ætlanina at yvirtaka málsøkið, er, at vit hava fingið eina nýggja hjúnabandslóg.

– Eftir henni kunnu trúarsamfeløg uttanfyri fólkakirkjuna, sum lúka ymsar treytir, fáa góðkenning til at gifta fólk.

– Spurningurin er nú, um tað framyvir verður mentamálaráðið, sum skal geva slíkt loyvi. Og tað ber ikki til, uttan so, at ávísar reglur eru á økinum.

Formaðurin í prestafelagnum sigur, at tá ið nú nýggi landsstyrismaðurin í kirkjumálum ikki er limur í fólkakirkjuni, setur tað eisini kikaran á tey viðurskiftini, at tað er alt málsøkið, sum verður yvirtikið.

Formaðurin í Prestafelagnum ivast eisini í, um tað er rætt at leggja kirkumál undir ein annan landsstýrismann, soleiðis sum Biskupur hevur skotið upp.

– Verður tað gjørt, kann kirkjan skjótt gerast ein kastibløka ímillum ymsar landsstýrismenn, sigur hann.



# Kommunusamanlegging í Vágum

**Arbeiðið við at leggja Bíggja Sóknar- og Sørvágs Kommunur saman er komið so mikið áleiðis, at fólkaatkvøða verður í Bø og Gásadali í næstu framtíð**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*


*Bøur er saman við Gásadali í Bíggjar Sóknar Kommunu. Verður úrslitið av fólkaatkvøðu í kommununi tað, at borgararnir vilja leggja saman við Sørvági, verður bara ein kommuna Uttan fyri Vatn*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Bø:**
Ein kommunusamanlegging í Vágum tykist eftir øllum at døma at vera heilt nær. Fólkaatkvøða verður í næsta mánað í Bø og Gásadali um at leggja kommununa saman við Sørvágs Kommunu.

Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggja Sóknar Kommunu, sigur, at á bygdarráðsfundi týskvøldið varð avtalað, at finnast skal fram til eitt uppskot, sum sendast skal í hvørt hús í Bø og Gásadali, so fólk fáa kunnað seg um málið, áðrenn tey skulu taka støðu.

Seinni verður so ein kunnandi fundur hildin fyri borgarunum í kommununi. At enda verður so ein vegleiðandi fólkaakvøða, har borgararnir skulu siga, um teir eru fyri ella í móti samanlegging.

Borgarstjórin í Bø sigur, at fundast hevur regluliga verið um samanleggingina, og nú er komið hartil, at hann væntar, at málið kann avgreiðast í mars mánað. Ætlanin er so, at samanleggingin skal fá gildi frá nýggjárinum. Kommunuval verður í heyst, og tá verður ætlandi valt eitt samlað bygdarráð.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvat fólk halda um hesa samanleggingina.

Borgararnir hava hug at halla báðar vegir, og bygdarráðið hevur gjørt av, at eingin endalig avgerð verður tikin, fyrr enn ein vegleiðandi fólkaatkvøða hevur verið um málið. Hóast tað, at bygdarráðið hevur fullan rætt til at taka ta avgerðina einsamalt.

Verður úrslitið, at fólk vilja leggja saman við Sørvágs Kommunu, verður beinanveg farið í gongd við tær fyrireikingarnar, sum krevjast. Verður tað hinvegin so, at meiriluti er í móti samanlegging, er einki at fyrireika, sigur Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Sóknar Kommunu.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvágs Kommunu, sigur, at har er eingin avgerð tikin í málinum enn. Bygdarráðsfundur verður í komandi viku, og tá fer bygdarráðið at viðgera málið og helst taka eina støðu, sigur hann.

# Samkomuhús í Gásadali

**Bíggjar Sóknar Kommuna umvælir skúlan í Gásadali, sum skal virka sum samkomuhús fyri fólkið í bygdini**

KOMMUNUTÍÐINDI

*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Gásadali:**
Gásadalsfólk fáa nú egið bygdar- ella samkomuhús. Tað er ein treyt fyri, at bygdarsamfelagið yvirhøvur kann vera til, sigur borgarstjórin í Bíggjar Sóknar Kommunu, sum Gásadalur hoyrir til.

Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri, greiðir frá, at farið er undir eina størri umvæling av skúlanum í Gásadali, sum í framtíðini skal brúkast til samkomuhús í bygdini.

Veggklædningurin innan er tikin niður, og klætt verður aftur við timburi, eins og nýtt trægólv verður lagt í. Somuleiðis verður eisini nýtt wc lagt inn og nýggj oljufýring og miðstøðuhiti innlagdur. Tað hevur ikki verið fyrr, sigur borgarstjórin.

Hann roknar við, at kommunan fer at brúka einastaðni millum 100.000,- og 150.000,- krónur til umvælinginga av skúlanum í Gásadali.

Pengarnir eru ikki so nógvir hjá eini lítlari kommunu sum hesari, sigur hann, og tá so hugsað verður um, at nýggj vatnveiting er gjørd í Bø, eru hetta rættiliga nógvir pengar, ið nú verða brúktir.

Bíggjar bygd hevur fingið heilt nýggja vatnveiting við reinsiverki og øllum sum hoyrir til, so har eru eisini nakað væl av pengum brúktir, sigur Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bø og Gásadali.


*Skúlin í Gásadali, vinstrumegin, verður umvældur fyri millum 100.000,- og 150.000,- krónur og skal brúkast til samkomuhús, tá umvælingin er liðug*
*Mynd: Edvard Joensen*